## Grønlendingar skulu heimaftur

Eins og Føroyar hevur Grønland tann trupulleika, at ungfólk, sum fara til Danmarkar at nema sær útbúgving, venda ikki heimaftur, tá tey eru liðug við útbúgvingina. Framskrivingar vísa, at Grønland fær stóran tørv á arbeiðsmegi við útbúgving tey næstu árini, og tí roynir heimastýrið at fáa grønlendingar í Danmark at koma heim, tá útbúgvingin er liðug. Í næstu viku skipar heimastýrið fyri ráðstevnu í Aalborg og Odense, har ætlanin er, at arbeiðsgevarar skulu fáa samband við fólk undir útbúgving, sigur KNR.



# Atlantic Supply Base størsta sáttmála nakrantíð

**Gongst sum ætlað, fer Eni undir at bora Anne Marie brunnin á vári næsta ár. Í hesum sambandi hevur italska oljufelagið gjørt sáttmála við Atlantic Supply Base í Runavík um allan flutning av útbúnaði til og frá borileiðini**

FRÁLANDAVINNA
*Hilmar Simonsen*
*hilmar@sosialurin.fo*



*Eli Lassen, stjóri í Atlantic Supply Base.*

Flutningsfelagið Atlantic Supply Base í Runavík hevur gjørt eitt ordans hál í samband við Anne Marie oljuboringina hjá italska felagnum Eni, sum eftir ætlan verður sett í gongd tíðliga á vári næsta ár. Atlantic Supply Base hevur nevniliga gjørt sáttmála við oljufelagið um allan flutning av útbúnaði til og frá borileiðini, sum er í landsynningshorninum av føroyska landgrunninum, tað sum plagdi at verða rópt »Gullhornið«.

Í undanfarnum boringum hevur tað verið soleiðis, at Atlantic Supply Base hevur staðið fyri einum parti av hesari tænastu, meðan Skipafelagið Føroya hevur staðið fyri einum parti. Men nú hevur Atlantic Supply Base sum sagt gjørt sáttmála um alla hesa uppgávuna í sambandi við hesa boringina næsta ár. So felagið fær uttan iva úr at gera.

- Vit vóna sjálvandi at fáa nóg mikið at gera, tó vænta vit ikki, at henda boringin verður so drúgv sum boringin seinasta vetur (William boringin hjá BP, blaðm.), sum jú dró nógv út orsakað av ringa vetrarveðrinum, sigur Eli Lassen, stjóri í Atlantic Supply Base.

Boringin kemur væntandi at taka einar 60 dagar, og um alt gongur eftir vild so kemur boririggurin West Phoenix í økið longu í apríl mánaði. Tó er ov tíðliga at siga enn, um alt gongur eftir bókini, og tí mugu fyrivarni takast fyri møguligum seinkingum, vísir Eli Lassen á.

### Úr 2 upp í 15 fólk

Eli Lassen dylur ikki fyri, at talan er um ein stóran ordra í teirra høpi, men kann av góðum grundum ikki siga, hvussu nógvan pening talan er um. Men sum skilst fær flutningsfelagið eina ásetta upphædd fyri hvønn dag, arbeiðið varir. At felagið einsamalt hevur fingið slíkan ordra ger tað neyðugt at seta nógv nýggj fólk í starv.

- Okkum kemur at tørva einar 15 mans tilsamans, so tað er ein stórur vøkstur í virkseminum fyri okkara viðkomandi, sigur Eli Lassen og vísir á, at felagið fyrr bert hevur havt 2 mans í starvi.

Atlantic Supply Base, hvørs eigari eru 19 ymsar føroyskar fyritøkur, hevur ikki annað virksemi um hendi enn at veita flutning í samband við frálandavinnu. Eli Lassen sigur, at tað ikki er óhugsandi, at felagið fer at kasta seg út yvir aðrar vinnumøguleikar í framtíðini, men at fyrilit mugu takast fyri áhugamálunum hjá eigarunum.

- Tað hevur týdning at tæna áhugamálunum hjá eigarunum og ikki traðka nakað av teimum 19 feløgunum yvir tærnar, heldur Eli Lassen fyri.

Tað kann ganga langt ímillum oljuboringar í føroyskum øki, so tað kemur ikki at vera nóg mikið av arbeiði árið runt hjá einum felag sum Atlantic Supply Base, og hetta er orsøkin til, at Eli Lassen hevur følaran úti eftir alternativum vinnumøguleikum.

*Runavík er heimstaður hjá Atlantic Supply Base*

